átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið



*Hesa vikuna:*

**John S. Myllhamar**

## Sum tjóvur á nátt

**Liðið er á náttina, og dagurin er í nánd. Latum okkum tí leggja av verk myrkursins og lata okkum í herklæði ljósins**

Rom. 13, 12

Tað er evsta dag, Paulus her hevur í huganum. Nær hann kemur, veit eingin. Jesus visti tað ikki sjálvur. Tí er tað burturspilt tíð at royna at rokna út, nær heimurin skal ganga undir, og Jesus kemur aftur. Tann dagur kemur ikki at standa í álmanakkanum. Dagurin kemur eins og tjóvur á nátt, heilt óvæntað. Eingin fær at vita tað frammanundan.

Men tað ræður um at fyrireika seg til hendan dag hvønn einasta dag, at hann ikki verður okkum ein ræðsludagur. Vit eiga ikki at seta okkum aftur á og brúka tað dýrtkeyptu tíðina til nyttuleysar útrokningar; men vit eiga at liva soleiðis, at vit, nær tað skal vera, eru til reiðar at møta Jesusi, tá ið hann kemur. Tað gera vit best við at lurta eftir áminningini hjá ápostlinum um, at leggja av verk myrkursins og lata okkum í herklæði ljósins.

Tað eru nógv sløg av verkum, menniskjan fremur, ið ikki tolir, at ljósið skínur á tey, so at øll kunnu síggja, hvat tað er, tey havast at. Slíkir døkkir gerningar eiga ikki at finnast í lívi hins kristna. Tað skal kennast á okkum sum børn at ljósinum, at liðið er á náttina. Er tað okkurt í lívi okkara, sum vit helst vilja hava fjalt í myrkrinum, er ikki í lagi hjá okkum. Vit eiga at leggja slíkt av. Vit kunnu ikki samráðast við Guð. Sælan fæst ikki fyri niðursettan prís. Tá ið hann fyrigevur okkum syndir okkara, eiga vit eisini at fara í bardaga móti syndini fyri at sleppa frá henni.

# Heilagranskari vil leita eftir bønini



*- Hvat hendir í heilanum, tá hendurnar verða hildnar saman í bøn? Henda spurning vil ein danskur granskari hava eitt svar uppá*

**Ein danskur granskari fer at skanna heilar hjá limum í Hvítusunnukirkjuni, sum standa upp ímóti náttúruvísindini og trúgva á grøðing gjøgnum bøn**

- Hvat fer fram í heilanum hjá einum menniskja, sum trýr meiri á grøðing gjøgnum bøn ella á læknarnar og náttúruvísindina?

Henda spurningin vónar Uffe Schjødt, sum er cand. mag og ph.d.lesandi at fáa meiri greiðu á. Hann er í hesum døgum í ferð við at skanna heilan hjá ungfólki úr Hvítusunnukirkjuni í Danmark, skrivar Kristelig Dagblad.

Heilaskanningin er ein partur av royndini at siga frá, hvussu átrúnaður ávirkar heilan og hvar hesin depil er at finna. Áður hava ung úr donsku Indre Mission (Heimamissiónin) verið í eini líknandi skanning, sum varð gjørd meðan tey vóru í bøn.

Í hesi nýggjastu royndini skulu teir ungu limirnir í Hvítusunnukirkjuni kortini ikki biðja undir skanningini. Henda verður ístaðin gjørd, meðan tey lurta eftir eini ljóðupptøku, har biðið verður fyri teimum - tað sum rópt verður forbøn.

- Tey flestu religiøsu menniskjuni viðganga markið millum náttúruvísindina og tað andaliga. Men Hvítusunnukirkjan er áhugaverd, tí hon er í beinleiðis kapping við náttúruvísindina. Her trýr ein á grøðing gjøgnum forbøn og heldur, at ein kann fáa bæði armar og bein at vaksa út umvegis bøn og rætta trúgv á Gud, sigur Uffe, sum er knýttur at gudfrøðideildini á Aarhus Universitet.

### Kemisk prosess í Gudi

Á altjóða støði hevur eisini verið ein vaksandi áhugi fyri granskingini innan staðsetingina av religiónini í heilanum.

Bæði religiónskritikkarar og ateistar eru javnan frammi við úttalilsum um, at religiónin er ein tvangstanki og er meiri at meta sum ein „virus" á heilanum.

Sjálvur metir Uffe Schjødt seg sum ikki-trúgvandi, men hevur einki ynski um at avlíva religiónina gjøgnum royndir sínar.

- Mítt ynski er at koma fram til eina vísindaliga frágreiðing um religión. Eg ætli mær tó á ongan hátt at avmarka hana. Men sohvørt sum vit gerast betri til at greiða frá religiónini, kunnu religiøs menniskju eisini byrja at skilja millum trúgv og vísind, soleiðis at hesi bæði hugtøkini ikki verða blandað saman, sigur hann.

Tonny Jacobsen, sum er formaður í leiðslubólkinum í Hvítusunnukirkjuni og fyri Frikirkenet heldur ikki, at ætlanin hjá heilagranskingini at staðbinda religiónina hóttir hansara persónligu trúgv.

- Eg haldi sjálvur, at religiónin kann lýsast biologiskt, men ikki einans biologisk. Heilagranskarar og ateistar kunnu kanska ávísa, at religión bara er ein kemisk prosess í heilanum. Fyri mær finst nevniliga ein frágreiðing um, at tann kemiska prosessin yvirhøvur er til. Og tann frágreiðingin eitur Gud, sigur Tonny Jacobsen.

## Skeið fyri øll hjún

**Filadelfia:** 31. januar byrjar eitt hjúnabandsskeið í Filadelfia, sum Filadelfiasamkoman skipar fyri. Skeiðið verður grundað á hjúnabandsskeiðið frá Alpha, og skeiðluttakararnir fáa allir hvør sína undirvísingarbók. Skeiðið verður hvørt hóskvøld og umfatar sjey undirvísingar, og varir fram til 13. mars. Endamálið við skeiðnum er millum annað at menna hjúnabandið, so parið fær hækkaðan samlívskvalitet, og at fyribyrgja og loysa trupulleikar í hjúnabandinum.

## Vetrarstevna á Sandoynni

**Skopun:** Hesa vikuna hevur missiónshúsið í bygdini skipað fyri árligu vetrarstevnuni. Møtini byrjaðu mikukvøldið í missiónhúsinum og halda fram hetta vikuskiftið í bygdarhúsinum Samljóð. Høvuðstalari á møtunum er Føroyavinurin Eivind Frøen úr Noregi, sum hevur vitjað her óteljandi ferðir. Umframt bønarløtur og lovsang luttaka fleiri sangbólkar, millum annað Ecclesia úr Klaksvík og Oasu-brøðurnir úr Havn.

## Tey ungu fara á legu

**Vatnsoyrar:** Umframt at skipa fyri teimum vanligu ungdómsmøtunum í samkomunum Ebenezer í Havn og í Lívdini í Hoyvík hvørja viku, fyrireika tey ungu í samkomuni nú seg til at fara saman á ungdómslegu í Zarepta í Vatnsoyrum. Evnið á leguni, sum verður vikuskiftið 8. til 10. februar er "Hvat er at óttast Gud?". Tekningarfreistin er úti 1. februar.

## Átak gav 25 nýggjar limir

**Blái Krossur:** Undan jólum skipaði nevndin í Bláa Kross Ungdómi fyri einum átaki at útvega fleiri limir. Hetta átakið gav felagsskapinum 25 nýggjar limir. Til tess at skapa áhuga fyri átakinum var boðað frá lutakasti millum teir nýggju limirnar um ein Ipod. Hepni vinnari var Elsebet A. Ellingsgaard (myndin) úr Klaksvík. – Eg haldi, at Blái Krossur ger eitt gott og gagnligt arbeiði, sigur hon við heimasíðuna hjá felagsskapinum.

